

*Leiðsluhátturin Corporate Religion snýr seg í stuttum um at geva fólki fatan av, at tey hava ávirkan og verða viðfarin sera menniskjaliga, men samstundis verða tey skúlað til at halda, at einasta rætta arbeiðsplássið á jørð er teirra egna*

miðlunum, ársúrslitini vaksa, og kursirnir fara til skýggja, er gleðin stór. Rørslan hevur tað gott, og onki kann koppa henni. Soleiðis tóktist lagið leingi at vera í Føroya Sparikassa, ið seinni gjørdist Eik Banki. Onki kundi koppa teirri sterku og gomlu eikini, ið hevði verið trygg sum ein bankaboks og síðan endurnýggjaði sítt virkisgrundarlag og legði kappingarneytarnar langt aftur um seg. Trúgvin á vøkstur var óavmarkað. Kenslan av felagsskapi var sterk sum í eini samkomu. Gleðiboðskapurin um nýmótans arbeiðsplássið við teimum dugnaligu stjórunum, ið tordu at leggja heimin undir seg, varð støðugt boðaður í fjølmiðlunum, ið ofta eisini lótu seg tøla av prædikum, ið vóru ílatnar sum fíggjartíðindi.

## Læran av skrædlinum

Byrjanin til stóra umskiftið hjá Eik var árið 1998. Tá orðaðu Marner Jacobsen og fleiri onnur eitt heilt nýtt virkisgrunarlag fyri stovnin, sum staðfesti, at Føroya Sparikassi skuldi gerast brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum, og at starvsfólkini skuldu vera framsøkin og hava tað stuttligt til arbeiðis. Farið varð undir hetta arbeiði fyri at skapa vøkstur. Stovnurin arbeiddi dúgliga eftir hesum setningi til 2008. Vøksturin var ovurstórur, uppkeypini vóru mong, og viðurkenningarnar vóru líka stórar. Forstjórin varð á leiðaradegi kosin ársins leiðari, og fyritøkan gjørdist á vinnudegi ársins virki. Var tað lætt hjá starvsfólkunum undir hesum umstøðum at vera atfinningarsom og ikki fegnast? Tað var tað ikki. Eik Banki var staðið at vera.

Læran av skrædlinum hjá Eik man so vera, at sama hvussu væl gongst tínum arbeiðsplássi, og sama hvussu stórar viðurkenningarnar verða, legg so ongantíð egnan fornuft til viks.

> **Onki kundi koppa teirri sterku og gomlu eikini, ið hevði verið trygg sum ein bankaboks og síðan endurnýggjaði sítt virkisgrundarlag og legði kappingarneytarnar langt aftur um seg**

Øll heimssøgan er sprenfull av søgum um, hvussu fólk og fyritøkur fingu sær ferð ímóti himni og síðan skrambladu til jarðar aftur. Orðatøk minna í ymsum útsetingum á, at hugmóð stendur fyri falli, og kristindómurin prædikar støðugt um eyðmýkt og mátahald. Kortini hendir tað aftur og aftur, at fólk nettupp ikki kenna sær hógv og brenna seg illa persónliga og fíggjarliga. Hvussu mong hava gjørt tað í Eik Banka, verður ikki mett um her, men at mong eru komin illa fyri í fíggjarkreppuni sum viðloyparar, er almannakunnugt, og orsøkin var uttan iva blind trúgv á vøkstur.

## Frælsi og tryggleiki

Eftir skrædlið í Eik Banka hava mangar røddar sagt, at fyrr ella seinni mátti ganga galið hjá bankanum. Soleiðis er altíð, tá fallið er veruleiki, gudarnir eru dotnir av skýggjunum, og pessimistarnir, ið áhaldandi bíða eftir at sleppa av við sína háð, loksins sleppa av við hana. Ein av stjórunum í Eik Banka hevur sagt, at tað einasta, sum í veruleikanum gekk galið, var fíggjarkreppan. Eik var í mangar mátar ein sunnur banki, og hevði fíggjarkreppan ikki rent íslendskar sparikassar um koll og sent fastognarprísirnar í Danmark í botn, so hóraði Eik Banki undan. Kanska er hetta rætt, men skelkurin hjá teimum starvsfólkum, ið fataðu Eik sum einasta sanna arbeiðsplássið, ja, tað besta og dugnaligasta arbeiðsplássið av øllum, man vera líka stórur fyri tað.

At vera í starvi er fyri mong tað sama sum persónligur tryggleiki. Húsalánini verða goldin, og matur kemur á borðið. Men summi eru farin at siga, at leiðslur, ið ov ídnar dyrka leiðsluháttin corporate religion, áttu at fingið meiri mótspæl, og tað fáa tær eisini í t.d. USA. Har hava tikið seg upp alsamt fleiri fræls arbeiðsfólk, ið ikki verða motiverað av at svørja einastu sonnu fyritøkuni ævigan trúskap, men síggja uppgávuna og góðu hugskotini sum sína størstu motivatión. Frælsu arbeiðsfólkini arbeiða við ymsum uppgávum og fyri fleiri fyritøkur samstundis. Tey eru støðugt á ferð eftir avbjóðingum, fáa fjølbroyttan íblástur, ja, eru fræls frá allari einoygdari trúgv. Hvussu mong tora hetta? Neyvan øll. Men skapar corporate religion tryggleika? Langt frá hjá øllum, eins og fíggjarkreppan hevur víst – eitt nú í Íslandi og Føroyum.